# Líkasæla ger av við optimismuna

TÓRA VIÐ KELDU
hjarta@kallnet.fo



**Um orka skal vera til lærarastarvið, er optimisman eitt krav. Hetta er optimisman, sum sær møguleika í hvørjum einstøkum. Starvið krevur, at vit geva undirvísing heiðurligt pláss, har vit síggja møguleikan hjá næminginum at vaksa og menna viðfødd evni at læra sum treyt og saman gera eitt arbeiði at koma longri**

Hetta ljóðar væl, men hóast fleiri góðir og dugnaligir lærarar dagliga eru virknir í føroyska fólkaskúlanum, eru tað alt fleiri, sum velja sær annað starv ella ikki trívast í lærarastarvinum. Gerandisdagurin í skúlanum er ov krevjandi, næmingar fylla ov nógv og uttan neyðug alternativ, gerast krøvini tó alsamt størri. Har líkasælan er, trívist optimisman ikki.

At venda hesi skeivu gongd, er óivað ein av stóru avbjóðingunum fólk innan skúlaverkið stendur fyri at loysa.

**Skúlin sjálvsagdur**

Fólkaskúlin er seinastu mongu árini blivin ein sjálvsagdur partur av nærum hvørjum fólkabygdum staði. Havi tó hug at halda, at hetta fyri mong, er vorðin ein alt ov sjálvsagdur partur av gerandisdegnum. Vit duga alt ov illa at seta orð á og síggja, hvussu stóran týdning skúlin og lærarar í veruleikanum hevur fyri samfelagið alt, og eisini fyri menningina av næmingum. Fyri summi er skúlin eitt gott uppihaldsstað, har næmingarnir hava tað gott og mangan verður sagt, at bara næmingarnir trívast, so er í lagi.

Júst hendan líkasælan drenar einhvønn lærara. Líkasælan, sum ikki dagliga hyggur í skúlataskuna, ikki orkar at gera ein passandi matpakka, er ov dovin at gera skúlating, tímir best at vera passivur og fara seint í song, heldur at lógir skúlans eru fjas og ikki hevur nakran hug at gera nakað sum helst fyri at betra hesa hugsan. Eg skal ikki siga, hvat orsøkin er, men eg kann staðfesta, at ikki er løgið, at fleiri ikki tíma at fáast við.

**Onki er broytt**

Onki er nýtt undir sólini, tí vit kenna allar hesar trupulleikar aftur frá gomlum døgum. Fór ein dagin í eina av stóru sitatbókunum og fann hetta sitatið:

"Vore dages ungdom elsker luksus. Den har dårlige manerer, foragter autoritet, har ingen respekt for ældre mennesker og snakker når den skulle arbejde. De unge rejser sig ikke længere op, når ældre kommer ind i et værelse. Den modsiger sine forældre, skryder i selskaber, sluger desserten ved spisebordet, lægger benene overkors og tyranniserer lærerne." Hetta eru orð av munni Sokratesar fyri meira enn 2000 árum síðani.

Eg má siga, at eg smíltist, tá ið eg las hetta og hugsaði, ja, lítið er broytt. Tó kunnu vit sanniliga siga, at sjálvt um trupulleikarnir ikki eru nýggir, er samfelagið ótrúliga nógv broytt seinastu tíðina. Óivað ger júst hetta allan munin.

**Skil á gerandisdagin**

Havi nakrar dagar hugsað um tað, sum mangan verður sagt undan skúlaársbyrjan, at tað verður gott at skúlin byrjar aftur, so dagurin aftur verður skipaður og skil kemur á. Hvat liggur í hesum setningi? Kundi hugsað mær, at avvarandi kanska gleða seg at hjálpa við skúlatingum, aftur fara tíðliga í song, fara upp at smyrja góðan matpakka, lesiløtan, áðrenn ljósið verður sløkt, kemur aftur á skránna og tað, sum hoyrir gerandisdegnum til.

Ella kundi tað verið, at fólk gleða seg meir til, at uppihaldstaðið aftur verður opið, so næmingarnir ikki allan dagin eru ábyrgdin hjá foreldrunum?

Tá ið vit hava valt, at hava eitt alment skúlatilboð til børn og ung, krevur hetta tilboð eitt virðiligt pláss í samfelagnum - bæði frá politikarum og avvarandi. Hetta skal sjálvandi vera saman við teimum neyðugu krøvunum, so tey, sum starvast har, hava møguleika at gera optimismu til part av starvinum. Hetta er optimisman, sum sær møguleika í hvørjum einstøkum, og har vit síggja møguleikan hjá næminginum at vaksa og menna viðfødd evni at læra sum treyt og saman gera eitt arbeiði at koma longri. Hetta krevur samarbeiði, vælvilja og ein erligan innsast.

# Altjóða tónlistarskúli á Eiði

ODDUR HENTZE
Leiðari hjá Norðljómi

Nú Eiðis kommuna fer at gera ein altjóða fótbóltsvøll, átti eisini ein altjóða tónlistarskúli at verið bygdur saman við felagshúsi og skýli, sum hoyra til tílíkar vallir.

Síðan Norðljómur varð stovnaður, t.e. tónlistarskúlin hjá Eiðis og Sunda kommunu, hevur skúlin m. a. húsast í fólkaskúlanum á Eiði. Men fólkaskúlin í dag krevur so nógvar serstovur o. a., at pláss bleiv ikki til tónleikaundirvísing.

Tá skúlin varð útbygdur, gjørdu tey eina fína tónleikastovu, men Norðljómur fekk aldri loyvi at nýta stovuna, tí vanlig skúlaundirvísing skuldi vera har.

Kommunan átti eini eldri hús í bygdini, ið kallast á Forunum, spurningurin var, um húsið skuldi takast niður ella ikki. Í øllum førum hevur tónlistarskúlin húsast her. Tónleikalærararnir vóru ógviliga fegnir, endiliga eitt hús, sum teir kunnu hava fyri seg sjálvar. Men synd er at siga at hetta hús er á einum altjóða støði, og sagt varð, at tað var ikki peningur at gera meir við húsið.

Av tí sama er Eiðis ljómfelag flutt av bygdini. Orkestrið Norðljómur somuleiðis, og ætlanin var at gera eitt næmingaorkestur afturat, men eitt er vist, á Eiði er ikki pláss at hava tílík orkestur. Synd tí tað eru eiðisfólk, sum manna ein stóran part av orkestrinum.

Tí fegnist eg um, at kommunan aftur hevur penging at gera nýggjan vøll og so sjálvandi nýta 1. mill eyka til tónlistarskúla. So kunnu ljómliðini spæla sambatónleik og trumma til dystirnar, í hálvleikinum verður tónleikur, hetta fer at gera tað ótrúliga stuttligt.

Eiðis bygd var í síni tíð størsta bygd í Eysturoynni, men hevur hesi síðstu árini staðið í stað og kanska minkað.

Hyggja vit eftir teimum stóru bygdinum í Eysturoynni, so eru tað Rúnavík og Fuglafjørður. Báðar bygdirnar ella býirnir hava mentunarhús, sum verða nýtt til tónlist, sjónleik o. a, men hava bara ein fótbóltsvøll í part. Eiði hevur ein vøll og ein annar vøllur er í Streymnesi, also tveir vallir til uml. 2200 fólk og nú skal Eiði hava tann tridja. Tad er heilt ótrúligt sum hesi fólk megna nógv.

Øllum førum koppar ein tónlistarskúli ikki Eiðis kommuni, tvørtur ímóti eri eg vísur í, at fólk eru ógviliga glað fyri tað sindrið av tónleiki, sum er í bygdini. Bygdin hevur avgjørt brúk fyri einum nýtímans tónlistarskúla við konserthøll, sum kundi verið nýtt til aðra list eisini. Tað vildi komið rættiligt lív aftur í bygdina.

Tær nýtímans barnafamiljur, sum koma heim aftur frá útlondum, hyggja sjálvandi eftir, hvar er ein góður skúli, mentunarlív og ikki minst ein altóða tónlistarskúli eru.

Eg skal ikki siga, at mentunarlívið á Eiði er steindeytt, men tónlistarskúlin hevur ikki nóg góðar karmar til, at nakað munagott skal koma burtúr. Og er tað nakað sum ger ein býling livandi, so er tað tónleikur.

Eg gleði meg at síggja fótbólt og hoyra tónleik við so góðum umstøðum, sum hesin vøllur skal kosta.

# Umvegis umhvørvis- og náttúrurøkt til ein betri búskap

POUL MICHELSEN
løgtingsmaður, Limur í rættarnevndini (umhvørvisnevnd løgtingsins) vegna Fólkaflokkin



Um 100 dagar verður stóra veðurlagsráðstevna í Keypmannahavn. Føroyar eiga at geva sítt ískoyti til ráðstevnuna við at seta sær høg orku- og umhvørvismál, vísa ábyrgd og samstundis brúka møguleikan til vinna búskaparligar fyrimunir.

Um 100 dagar verður stóra veðurlagsráðstevna í Keypmannahavn. Umboð fyri landsstýrið og løgtingið fara at luttaka á ráðstevnuni. Við sær skulu umboðini hava eina løgtingssamtykt, sum fráboðar alheiminum hvønn orku- og umhvørvispolitikk og nú bíða vit spent eftir útspælinum hjá landsstýrinum.

Um ársskiftið kom út bóklingurin »Skjótt syftir seiður og tunga takið«. Bóklingurin var eitt hugskotskatalog, sum lýsti nakrar av teimum møguleikum, sum vit kundu framt fyri at minka um útlátið av veðurlagsgassum. Hugskotskatalogið er samstundis eitt gott ískoyti í arbeiðinum at tilevna ein nýggjan umhvørvis- og orkupolitikk fyri Føroyar.

Ein nýggjur framskygdur politikkur á hesum øki eigur at hava høg mál og tryggja, at vit minka um útlátið av veðurlagsgassum tey næstu árini 10 – 15 árini ájavnt við tað, sum hini londini gera.

At seta slík krøv til okkum sjálvi, kann bitra undir eina spennandi, eggjandi og mennandi hugskotstilgongd, sum í síðsta enda kemur at økja um okkara kappingarføri og betra um ein sjálvberandi føroyskan búskap.

Vit atlit til ein burðardyggan orku- og umhvørvispolitik eiga vit:

- at menna nýggjar alternativar orkukeldur
- at menna og granska nýtt orkutøkni
- at berta um búskapin við at minka um oljunýtsluna, sum við hækkandi prísum verður ein støðug hóttan móti búskaparligari menning
- at brúka lágkonjukturin til fremja orku- og umhvørvisáløk.

Annika Olsen, landsstýriskvinnum í orku- og umhvørvismálum kemur vónandi skjótt - vegna landsstýrið - við einum uppskoti í løgtingið, sum m.a. gongur omanfyri nevndu setningum á møti.

Tað er sera týðandi at vit røkka einari breiða semju í løgtinginum, og at framtíðar politikkur føroyinga í umhvørvis- og orkumálum er kjølfestur í einari tryggari breiðari løgtingssamtykt, sum røkkur meira enn eina samgongu fram.

Vit eiga at síggja møguleikarnar í einum nýggjum umhvørvis- og orkupolitikki heldur enn forðingarnar. Gera vit tað verða vit partur av búskaparmenningini, sum kemur.

# Rolf og atlas: »Elfinbeinskysturin«?

KÁRI LEIVSSON

Mær kunnugt er danskt eitt mál ið verður tosað á einum tanga og nøkrum hólmum norður úr Týskalandi - umframt at verða trýst niður yvir Inuitar í Kalaadlit Nunaat.

Mær kunnugt er danskt ikki nakað heimsmál. Men tó eru nakrir føroyskir pseudokosmopolittar við danosentrisku heimsmyndini sum halda at nalvi alheimsins liggur við Oyrarsund. Sanniliga, sanniliga eigi eg eitt danskt Atlas. Hetta Atlas gevur mær donsk nøvn fyri heimsins lond. Hvussu vága teir sær?

At nevna España: »Spanien« er tað reina blasfemi. Og hvat siga frakkar til at teirra vakra France verður nevnt »Frankrig«? Og Hrvatska »Kroatien«? Og United States »Forenede Stater«? Og hoyr nú: í sínum Ivory Tower siga teir jú »Elfenbenskysten« - skulu vit føroysku kosmopolittar so ikki siga »Elfinbeinskysturin«?

Rolf kann hóskandi spyrja André vinmannin hvat »Rusland« eitur á russiskum - og so skulu vit nýta tað russiska heitið í okkara framtíðar altjóðligu landakortabók, og ikki nakran danskan peruvelling. Veit tann fjølmenna tjóð eystanfyri hvat »Rusland« er fyri nakað?. Nær er tað vorðið konsensus í internationalari geografi at brúka donsk nøvn um heimsins lond? Hví skulu vit so gera tað í Føroyum?

Mær kunnugt hevur tú Rolf í mong ár verið lektari á Geografisk Institut í Danmark. Sig mær - brúkti tú tá høvið og tín autoritet til at mótmæla donskum Atlasum sum hava frátikið heimsins londum og ríkjum teirra røttu nøvn?

**PS** Tú skrivar um føroyskt skrivtmál og støddfrøði (matematikk) í sama andadrátti, og tykist meina, at tá skúlin ikki megnar at læra nútíðar næmingar føroyskt mál, so er tað málið ið er trupulleikin og tískil eigur at broytast.

Brúktu vit somu øvugu logikk um aðrar lærugreinir, Rolf, so áttu vit at komið til ta niðurstøðu, at um skúlalærarar hava trupulleikar við at læra onkran árgang matematikk ella geografi, so er neyðugt at broyta matematisku grundreglurnar og geografiska veruleikan - staðin fyri at bøta um útbúgvingarnar.